# Tvey ár við brúktum fløgum og filmum



*H..C.W. Tórgarð hevur í nógv ár selt tónleik í Sverrisgøtu í Havn. Fyri tveimum árum lat danin Jesper Sundien upp handil beint viðsíðuna av við brúktum fløgum og filmum á dvd*

**Eitt sindur goymdur á fyrstu hædd í Sverrisgøtu í Havn liggur ein serligur handil, ið fylti tvey ár leygardagin. Her selur danin Jesper Sundien brúktar fløgur og filmar**

HANDIL
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Fyri skjótt fýra árum síðani kom danin Jesper Sundien til Føroya við familju síni. Tað fyrstu tíðina arbeiddi hann sum bilførari, men í viðførinum til Føroya hevði hann eitt hugskot um at stovna egnan handil. Hetta skuldi ikki vera ein vanligur handil, men ein handil sum keypir og selur brúkar fløgur og filmar.

Eingin handil av slíkum slag finst í Føroyum, men eru vælumtóktir aðrastaðni. Til dømis í Danmark og serliga Týsklandi.

Handilin hjá Jesper Sundien kallast M & M, sum stendur fyri Music and Movies. Viðskiftafólkini eru serliga ung fólk upp í 30-35 ár, sigur eigarin.

Í sambandi við føðingardagin leygardagin bjóðaði handilsmaðurin kaffi og lagkøku og avsláttur á vørunum.


*Tríggir smáir kundar í handlinum hjá M&M*


# Stjóri til TRYGD




## Vit leita eftir stjóra, ið miðvíst og við umhugsni kann leiða felagið enn longri fram á leið.

Trygd er eitt nýmótans tryggingarfelag, ið kann bjóða nærum øll sløg av skaðatryggingum innan privattryggingar, vinnutryggingar og sjóvátryggingar.

Trygd varð stovnað í 1932. Føroya Banki eigur allan partapeningin í felagnum. Trygd er eitt fíggjarliga sterkt felag, sum í 2006 hevði tryggingargjøld á 72 mió. kr. Við ársenda 2006 var eginognin 97 mió. kr. Felagið hevur um 30 dugnalig starvsfólk knýtt at sær.

Trygd hevur havt vaksandi úrslit seinastu árini, og vit vilja framhaldandi økja um hesi.

**Starvið krevur,** at tú brennir fyri at skapa vøkstur og úrslit. Somuleiðis hevur tú evnini til strategiska leiðslu, umframt tað at leiða starvsfólk.

**Tú hevur** hægri útbúgving frá góðkendum lærustovni ella samsvarandi royndir at stjórna eini fyritøku. Kunnleiki til tryggingarvirksemi er fyrimunur, men tó eingin treyt.

**Sum persónur** sýnir tú opinleika, treysti og ein kveikjandi hugburð. Tú dugir at samráðast og vegleiða og finnur íblástur frá innihaldinum í starvinum, ið er ein samanseting av rakstrarligari ábyrgd og menning av felagnum. Tú sýnir eisini fjølbroytni, tá tað snýr seg um menniskjaligar relatiónir.

**Sum stjóri** hevur tú beinleiðis ábyrgd av dagliga rakstrinum av felagnum og skalt tryggja framhaldandi menningina. Tú verður berandi megin í felagnum og gevur í dagliga yrkinum íblástur til viðskiftafólk, starvsfólk og eigara.

**Setanarviðurskiftini** verða avtalað millum teg og nevndina í felagnum.

**Send umsókn tína** við CV til: Janus Petersen, nevndarformann, c/o Føroya Banki, Húsagøta 3, Postboks 3048, FO-110 Tórshavn.

**Meiri fæst at vita** við at seta seg í samband við Bjarka Mohr, starvsfólkaleiðara, á tel. 330 330 ella á bm@foroya.fo.

REPROZ

**UMSÓKNARFREISTIN ER 24. SEPTEMBER 2007**

**TRYGD**
leitar eftir tær.